H71

Faldari 6

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

H71 - StÍF

Leygardagin 13. desember kl. 18.00

Hoyvíkshøllin

BONUS

J&K

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Advokatfelagið
Yviri við Strond4

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03

polytan

Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri

Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

H71 KVINNUR Á FREMSTU RÓK UM FÁ ÁR

TAÐ ER EIN ROYNDUR LUTUR, AT H71 ALTÍÐ HEVUR HAFT TRUPULLEIKAR VIÐ AT FÁA KVINNUPARTIN AV FELAGNUM AT BLÓMA. NÓGVAR OG GÓÐAR ROYNDIR HAVA VERIÐ GJØRDAR, HIGARTIL TÓ TIL FÁNÝTIS.

Nú hevur felagið so av álvara sett sær fyri, at vinna á hesum trupulleika. Miðvíst og skipað hevur seinastu árini verið arbeitt við at gera fundamentið í yngstu deildunum og hava góðar kreftir innan felagið arbeitt við hesum við sera góðum úrslitum.

Í ár hevur felagið so fingið góðar venjarakreftir til at taka sær av gentuliðunum. Soleiðis venur Petur Martin Johansen G17 og Jakob Jónsson, venur G14. Og eingin ivi skal vera um at hetta eru tveir sera hugsavnaðir persónar, ið duga bæði at seta sær mál og at røkka teimum.

Tað gav eisini at býta um dagarnar tá vit undir stórari yvirskrift bæði á forsíðuni og um alla baksíðuna á vikuskiftisblaðnum hjá Sosialinum kundu lesa hesa yvirskrift: „H71 kvinnur í bestu deilidni innan 5 ár“. Orðini eigur Jakob Jónsson, og eru eitt greitt signal frá honum um, at innan 5 ár, skal eisini kvinnuhondbolturin hjá H71 vera á fremstu rók í føroyska hondbóltsheiminum.

Sigast má, at yvirskriftin fangaði alt fyri eitt. Orðini sóu so løtt og logisk út og eins og signaleraðu, at sjálvsagt verður kvinnudeildin hjá H71 tað. Er tað ikki púra greitt? Vit hava stórsta og ein tann evnaríkasta hóp av gentum í landinum, sera væl kvalifiseraðar venjarar og eitt ítróttarfelag, sum nýtur nógva tíð og stóra orku uppá at skapa hondbóltinum í Hoyvík so góðar karmar sum til ber. So allar fortreytir fyri at rokkið einum slíkum máli skuldu verið í lagi.

Kvinnuparturin í H71 hevur annars alt frá byrjan verið ein forsømdur lutur (á leikvøllum væl at merkja, men so sanniliga ikki tá um nevndararbeiði og annað arbeiði kring karmarnar hjá felagnum ræður). Í nógv ár var ta ein vittigheit í felagnum, at H71 vildi bert

framhald á síðu 13

2x3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Avatara

Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

AVATARA

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.

- Júst sum træ at síggja til
- Strukturin kennist sum træ
- Heitt og mjúkt at ganga á
- Luktfrítt og heilsugóðkent
- Slitsterkt sum laminatgólv

Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN

VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
Heldfer
SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.

Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

SENDISTOVAN

BANKNORDIK

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Dekk

- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil

- sjálvandi frá Bilrøkt!

Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00

bilrokt.fo

Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

WAAG & Co. PF
Hoyviksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo

www.waagbilar.fo

OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00

Waag & Company er stærsta bílasala í landinum við flest seldum bílum í 2009, 2010, 2011 og 2012. Waag & Company umboðar bílmerkini Citroen, Mercedes-Benz og Mitsubishi og hevur tryggjarnir verksteð til viðlíkahald og umsetingar. Umframt bílasalu og verksteð umboðar Waag & Company Diesel vátnbógvi.

WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen

Fá tær
Familju ískoyti
Ring **202020** ella skriva til
vodafone@vodafone.fo

Familju ískoyti til Vodafone RED

fyri hvørt barnið

29,- kr./mór.

✓ **Frí tala**
✓ **Frí sms**
í familjuni

Við Familju ískoyti til Vodafone RED kunnu tit tosa og sms'a frítt í familjuni fyri einans **kr. 29,-** fyri hvørt barnið.

So kunnu tit kenna tykkum **trygg**, at tykkara barn fær samband við tykkum, eisini, tá ið eingin talutíð er á.

Les meira um familju ískoyti á **vodafone.fo**

Kaj Andreasen & Co

Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum

TIT HAVA TØRVIN VIT ERU VEITARIN.

Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

www.andreasen.fo

facebook.com/Kaj.Andreasen.Co

H71

framhald av síðu 4

» *Skulu vit hava eitt fullskipað hondbóltsfelag í Hoyvík, so mugu vit hava eina kvinnudeild eisini á fremstu rød*

hava kvinnur við til jólaborðhaldið og sannast má, at merkiliga illa hava genturnar trivist í felagnum. Ofta hevur felagið fingið sær renningarlop fyri at fáa mannað kvinnulið, ið skuldi røkka ovastu rók, men eru royndirnar altíð miseydnaðar. Hava til tíðir haft heilt góð gentulið í yngri deildum, men er altíð follið frá áðrenn genturnar hava rokkið vaksnamannadeildina. Í nøkur ár hevði felgið eitt vaknamannalið í næstbestu kvinnudeildini, ið bankaði uppá hjá fremstu deildini, uttan at tað tó eydnaðist at sleppa uppí part. Í løtuni hevur felagið ongan kvinnuligan leikara (burtursæð frá Ann, Gunn og Annbritt), ið hava aldur til vaksnamannadeildina og leikararnir á liðum felagsins í G17 er fyri ein stóran part í yngra endanum av tí árganginum. Men hóast tað, so kennist útsøgnin hjá Jakob Jónsson so merkiliga logisk, ítøkilig og røkkandi. Kanska er løtan júst nú. Í fleiri ár hava yngstu gentuliðini hjá felagnum klára seg væl og eru hesar gentir nú um at røkka aldrinum at luttaka í vaksnamannadeildini, so vón kann vera fyri, at so nógvar hanga við komandi árini, so felagið, kanska við onkrum styrki uttanífrá, kann røkka upp á ovastu rók innan kvinnuhondbolt.

Skulu vit hava eitt fullskipað hondbóltsfelag í Hoyvík, so mugu vit hava eina kvinnudeild eisini á fremstu rød. Sum nú er, er H71 stórsta hondboltsfelag í landinum, men allíkavæl er felagið bert hálvt.

Tað er altíð avgerandi at seta sær mál, skal vinnast framá her í lívinum, og er hetta so sanniliga eisini galdandi innan ítróttarheimin. Nú er so í føroyska blaðheiminum fest á blað, at sett er út í kortið fyri at H71 innan stutt

áramál skal vera við á ovastu rók innan kvinnuhondbolt.

Eitt er í øllum førum vist, at um Petur Martin og Jakob hava sett sær fyri, at kvinnurnar skulu vera við í fremstu deildini innan stutt áramál, so skal vera løgið, um hetta mál ikki verður rokkið. Genturnar í G17 hava í øllum førum givið okkum øllum grundarlag fyri at trúgva slíkari ætlan. Tað var nevniliga ein fragd, at síggja oddadystin hjá G17A leygardagin ímóti Neistanum A, har gentulið okkara vann 23-20, eftir at hava verið aftanfyri við heilum trimum málum miðskeiðis í øðrum hálvleiki. Gentunar sóu so sanniliga út til at hava lagt sær ambitiøsu ætlarnirnar hjá venjarunum í geyma og vit áskoðarar sótu eftir dystin við eini kenslu av, at tað neyvan er ivi um, at vit við hetta lað, hava kvinnulið í fremstu kvinnudeildini í seinasta lagi um 5 ár.

MENTALAR FORÐINGAR

Eftir: Kristionnu Winther Poulsen

MENTALA STYRKIN KANN VENJAST

Tað mesta handlar um tað mentala, segði Jóannes Jakobsen, hjálparvenjari hjá føroyska fótbóltslandsliðnum eftir føroyska sigurin móti Grikkalandi tann 14. november. At mentala støðan hevur týdning, kann Ann-Britt Mortensen bara geva Jóannesi rætt í. – Mental styrki hevur nógv at siga og er ein førleiki, sum vit øll hava tørv á og kunnu brúka allastaðni í lívinum, sigur Ann-Britt.

ØLL KUNNU STYRKJAST MENTALT

Mental styrki er ikki arvalig, men kann venjast. Nøkur menniskju trívast betur, tá tey møta mótgangi, enn onnur. Men øll kunnu venja, so at tey styrkjast mentalt. Vit mugu læra bæði børnini og okkum sjálvi at busta teir ringu tankarnar av okkum, tí tað er viktugt ikki at trúgva hvørjum ringum tanka, sum kemur til okkara. Børnini skulu læra ikki at taka tingini persónligt, og at vit onkuntíð bara mugu lata tingini fara, sigur Ann-Britt.

SKIPAÐ TILGONGD

Júst sum likamlig og teknisk styrki krevur mental styrki eisini skipaða og regluliga venjing. Við góðari mentalari venjing gerast leikarar betri á vøllinum, umframt at tey koma skjótari fyri seg eftir ósigrar.

Hyggjuráðini frá Ann-Britt eru, at minni áherðsla skal leggjast á at vinna, meðan venjarin eigur at fokusera á mál, sum verða tengd at sjálvari tilgongdini. Eisini skulu børnini eggjast til at fokusera á tey viðurskifti, sum tey hava ávirkan á og kunnu hava ræði á.

AT TAKA ÁBYRGD

Eftir at liðið hevur tapt, er lætt at skylda uppá dómara, venjara, liðfelagar ella vøllin. Men um leikararnir hava eina góða mentala styrki, megna tey at leggja dent á viðurskifti, sum tey veruliga kunnu ávirka – tað vil siga egin avrik. Um vit skylda uppá onnur, umframt at vit grenja og royna at rættvísgera ósigurin, sita tey ungu eftir uttan orku og uttan møguleika at hava ávirkan og uttan at kunna gera broytingar. Men um leikararnir hinvegin taka ábyrgd av egnum avrikum og egnum leikluti í úrslitinum, kunnu tey fáa betri tamarhald á upplivingini og harvið gera tingini øðrvísi og betur eina aðru ferð.

DYSTIR EITT GOTT HØVI

At spæla dyst er eitt gott høvi hjá børnum og ungum at venja tað at uppliva og møta mótstøðu. Tey læra at standa á egnum beinum, bæði á vøllinum og tá tey sita á bonkinum. Men uttan mun til sigur ella tap, skulu vit foreldur rósa børnunum fyri avrikið. Vit skulu læra tey at skilja ímillum góð úrslit og mistøk. Tú ert ein vinnari, um tú stríðist. Og hevur barnið

> *Mental styrki hevur nógv at siga og er ein førleiki, sum vit øll hava tørv á og kunnu brúka allastaðni í lívinum*

spælt vánaligt, skal tað hava at vita, at tað ikki er barnið sjálvt, sum er vánaligt, men at øll kunnu hava ein vánaligan dag, sigur Ann-Britt.

Sum foreldur kunnu vit stuðla børnunum í at læra okkurt nýtt frá hvørjari ítróttaruppliving. Ítróttur snýr seg um at læra at handfara avbjóðingar og forðingar. Hvønn atburð og hvørja tilgongd velja tey at hava til ítróttin?

RÓS HELDUR ENN ATFINNINGAR

Vit menniskju hava lyndi til at leggja áherðslu á mistøk heldur enn at rósa. Men veruleikin er, at vit mennast nógv meira av rósi enn av atfinningum. Lutfallið er eitt til seks, tað vil siga, at fyri hvørja atfinning eitt menniskja fær, skal tað hava rós seks ferðir fyri at mótvirka ringu ávirkanini av atfinningini. Men tá tú rósar, er neyðugt at vísa til ítøkiligar hendingar, tí annars fær barnið lítið og einki serligt burturúr, sigur Ann-Britt.

HVØR ER ANN-BRITT?

Annbritt Mortensen býr í Hoyvík saman við manni og tveimum døtrum, sum báðar spæla við H71, ein við gentum 17 og ein við gentum 10.

Ann-Britt er útbúgvin sosialráðgevi, mediator og hevur eftirútbúgving innan kognitivar viðgerðarhættir. Seinasta summar varð hon liðug við eina Masterútbúgving í positivari sálarfrøði. Hon skrivaði høvuðsuppgávu um mentala venjing innan ítrótt. Ann-Britt arbeiðir í Kvinnuhúsinum, umframt at hon ráðgevur innan styrkigrundaða menning á arbeiðsplássum.

HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

Alder?
21 år.

Hvilken plads spiller du på?
Højre back/fløj.

Hvilken AA spiller synes du er den mærkeligeste?
Ingen kommentar.

Dovneste?
Hallur Biskoptø.

Største „dramaqueen"?
Ham jeg deler nationalitet med.

Har den flotteste røv?
Helst ingen kommentar, men måske vores forsvarsspecialist, hvis jeg absolut skal vælge en. Hallur!

Hvad er din største/bedste håndboldoplevelse?
Debutkamp for Stoholm Håndbold i 1.div mod HC Midtjylland.

Top 3 mest spillede sange på din telefon/ipod?
Alle sange med Biffy Clyro.

Hvornår fik du dit første kys?
Der er min hukommelse for dårlig.

Vasker du dit eget træningstøj?
Ja det er jeg nødt til.

Hvilken person sammenligner du dig selv med – i al hemmelighed?
Sammenligner mig ikke med nogen.

Skorede du flere mål i din seneste kamp, end du har skoret damer i dit liv?
Nej, det håber jeg da ikke!

Hvad er dit yndlings #hashtag?
Bruger aldrig hashtag#.

Hvad gør H71 til bedste håndboldklub på færøerne?
Det er den bedste klub, fordi man føler sig godt tilpas i klubben som ny spiller, disciplinen er god, trænerne er dygtige.

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Takk fyri at tú stuðlar Javna

Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

Grafo Vestri

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 208090
javni@javni.fo
www.javni.fo

VB

polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
far: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu godkent

At hann líkist øllum hinum bilunum, ella … Spyrt tú eigaran av bilinum á myndini, dámar honum best takið og síðuspeglini. Hann kom inn á skeltiverkstaðið hjá Føroyaprent, og hokus, pokus, nakrar tímar seinni fór hann fresandi av stað aftur, við niður rullaðum vindeygum og tónleikinum drønandi frá. Sólbrillurnar sótu perfekt í mjørkanum!

Ávaring: Lat ikki lykilin sita í, um tú fert uttanlands við einum bili sum hesum…

Stílurin er tín, næstan alt ber til. Folia fæst í øllum litum og kann skerast út til búmerki, myndir ella tekst. Bilurin á myndini hevur carbon foliu á takinum og síðuspeglunum.

Føroyaprent
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo

MEGA
WWW.FACEBOOK.COM/MEGA.SMS
OUTFITTERS NATION

VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

www.torshavn.fo

Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA



Netbankin Tablet er komin

Eik Banki P/F
Tel. 348000

www.eik.fo

"Netbankin Tablet gevur mær frælsi og tíð til at gera tað, sum eg havi bestan hug til."
- Bjørk Herup Olsen, rennari

Avgreið tíni fíggjarligu viðurskifti - uttan mun til tíð og stað. Netbankin Tablet er tann sami sum netbankin á telduni, uttan nakrar fáar funkur.

Netbankin Tablet riggar við iPad og Android teldlum, og er ókeypis at stovna og hava.

FLØSKUINNSAVNAN FYRI H71 2. JANUAR

FRÍGGJADAGIN TANN 2. JANUAR 2015 ER AFTUR FLØSKUINNSAVNAN TIL FRAMA FYRI UNGDÓMSARBEIÐIÐ HJÁ H71. LEIKARAR FARA AT GANGA Í HÚSINI OG SPYRJA UM EIN VIL STUÐLA VIÐ AT LATA FLØSKUR. TILBER AT SETA POSAR UTTANFYRI UM EIN IKKI ER HEIMA ELLA AT RINGJA TIL ONKRAN Í NEVNDINI AT AVTALAÐ AVHEINTAN.

VIT TAKKA FYRI STUÐULIN

Stuðlajól í Hoyvíkshøllini

JÓLAHALDIÐ VERÐUR Í HOYVÍKSHØLLINI MÁNADAGIN TANN 15. DESEMBER 2014 FRÁ KL. 17 TIL UMLEIÐ KL. 19.30.

Frá kl. 17 og umleið ein tíma fram verður ein hugnaløta, har vit fara at dansa um jólatræið, vit fáa jólamenn á vitjan við pakkum til børnini og borðreitt verður við kaffi, te, smurdum breyði og køkum. Hvør familja verður biðin um at hava eitt fat av smurdum breyði við.

Aftaná hugnaløtuna verða hondbóltsdystir, har nøkur av yngru liðunum fara at spæla hondbólt ímóti foreldrum.

Systkin, foreldur, ommur, abbar og onnur er sjálvandi vælkomin við.

Vit vóna at síggja nógv fólk í høllini.

Vaksin og børn skulu vera í ítróttarskóm og klár til ein dyst um neyðugt.

Vit ynski um eini gleðilig jól og eitt gott nýttár.

Heilsan
H71 Stuðlar

NÆR BYRJAÐI H71 AT LEIKA HONBÓLT

SUM FLESTU KUNNUGT, SO BYRJAÐI FELAGIÐ H71 VIÐ FÓTBÓLTI Á FLØTUNI Í HOYDØLUM. KAPPAST VAR MEST ÍMÓTI ØÐRUM BÝLINGUM NIÐRI Í HAVN, ÍMÓTI MILLUM ØÐRUM BOÐANESDREINGJUM, TERNURYGGI, FRÚUTRØD OG ØÐRUM BÝLINGUM. EISINI LUTTÓKU DREINGIR Í INNANDURAFÓTBÓLTSKAPPINGUM Í ÍTRÓTTARHØLLINI Á HÁLSI. SEINNI VARÐ BORÐTENNIS OG BADMINTON EISINI ÍTRÓTTARGREINAR Í H71.



Systkinabørnini Poul Johannes og Ásvald sum smádreingir. Myndin er tikin úti á Rossaliði í Hoyvík.

Eftir: Jákup Símun Simonsen

Men nær byrjaði so hondbólturin í H71 av álvara? Sjálvur minnist eg hetta væl, sum einaferð um miðju sjeytiárini, men at seta endaligt árstal og dagfesting fyri fyrsta leikta dysti hjá H71 mátti eg fara at kann nærri. Sjálvur mintist eg tað soleiðis, at tveir av stovnarunum av H71, Poul Johannes Hovgaard og Ásvald Simonsen, tóku stig til at melda eitt unglingalið til landskappingina í hondbólti hjá hondbóltsdeildini hjá ÍSF. Hesir báðir, saman við øðrum hoyvíkingum, leiktu tá hondbólt í Neistanum, men nú skuldi tað vera. Kappingarnar vóru tá skipaðar sum summar-

kappingar av tí orsøk, at bert tvær ítróttarhallir vóru í Føroyum í sjeytiárunum, í Klaksvík sum kom í 1968 og í Havn í 1970.

Sjálvur fylgdi eg væl við hesum unglingaliði og sá mestsum hvønn dyst. Eisini høvdu teir fingið sær styrk. So vítt eg minnist, so mannaðu hesir leikarar liðið: *Poul Johannes Hovgaard, Hákun Djurhuus, Louis Gullfoss, Sjúrður V. Johannesen, Ásvald Simonsen, Svend Andreassen, Albert Ellefsen, Regin Hilduberg, Karl Johannes Djurhuus (Karli), Dánjal Klein Christiansen*. Vant varð dúgliga í fimleikahøllini í studentaskúlanum í Hoydølum.

Men nær varð hetta? Við góðari hjálp og vegleiðing frá nýggja skrivstovufulltrúanum í hondbóltssambandi Føroya, Halli Danielsen, so kom eg nærri málinum. Talan er um kappingarárið 1977 og fyrsti dystur stendur til at vera leiktur 16. apríl 1977 í ítróttarhøllini á Hálsi ímóti VÍF. Úrslitið var 12-17 til VÍF, ið eisini gjørdist føroymeistari hetta árið. Men úrslitini vóru bara heilt góð hjá H71. Javnt ímóti Neistanum og vunnu við einum málið 14-13 á Kyndli. Minnist serliga væl Bent Jákup Hansen í Kyndli frá hesum dysti. Hann mundi skjóta meginpartin av málunum hjá Kyndli.

Minnist væl, at vit yngru gingu á teir eldru um, at vit eisini vildu sleppa at royna okkum. Poul Johannes, Louis og Hákun átóku sær at venja okkum og var hetta eisini í fimleikahøll studentaskúlans í Hoydølum.

Men nær fóru vit, ið yngru vóru, at leika? Tað fekk eg eisini endaligt svar uppá, tí sama ár í 1977 eru eisini eitt smádreingjalið og eitt piltalið meldað til kappingina. Á piltaliðnum var eg sjálvur við á. Smádreingjaliðið við Petur Even og co. stendur til at hava leikt sín fyrsta dyst norðuri í Kollafirði, tann 23. apríl 1977 ímóti KÍF. Ùrslitið gjørdist eitt tap á 10-1. Piltaliðið stendur til at hava leikt sín fyrsta dyst í ítróttarhøllini á Hálsi tann 20. apríl 1977 ímóti Neistanum b. Her varð eisini talan um eitt líka stórt tap á 10-1. Men seinni gekst munandi betur hjá báðum liðum í kappingini. Kanska onkur fer at útgreina leikararnar á hesum liðum í seinni grein her í blaðnum.

Tað skal tó sigast, at onkur av teimum eldru enn tvíheldur um at byrjað varð í unglingadeildini í 1976, men tað fekk eg ikki staðfest í míni kanning.

Poul Johannes Hovgaard stendur sum umboðsmaður fyri øll trý liðini í landskappingarskipanini hjá ÍSF – hondbóltsdeildini hetta árið. Eftir hetta eina unglingaárið í H71, so fór Kyndil avstað við Poul Johannesi, har hann leikti nógvar dystir, sum ein av teimum stóru hoppskjúttunum, ið Føroyar hava havt. Hann kom eisini á føroyska hondbóltslandsliðið, men gavst rættuliga ungur at leika hondbólt.

Hetta vóru nøkur brot úr fyrstu tíðini, tá ið vit fóru at leika hondbólt í H71. Síðani eru dagar og ár liðin, og nú stendur H71 skrásett sum størsta hondbóltsfelag í Føroyum. Umstøðurnar blivu munandi betri og broyttar, tá ið Hoyvíkshøllin varð bygd í 2002. Men vit eiga samstundis at takka øllum teimum kreftum, ið hava virkað, og teimum sum í dag standa á odda í felagnum fyri, at felagið er tað, sum tað er í dag.

H71

HH = Hoyvíkshøllin FH = Fimleikahøllin í Hoyvíkar Skúla SvL = Skúlin við Løgmannabreyt

Kl	Mánadag	Týsdag	Mikudag		Hósdag	Fríggjadag	
	HH	HH	HH	SvL	HH	HH	SvL
14:00	G10		D12		G10	D10	
14:30	G10		D12		G10	D10	
15:00	U8	D10	D12		D10	D14	
15:30	U8	D10	D12		D10	D14	
16:00	G12	D12	U8	G10	D12		
16:30	G12	D12	U8	G10	D12		
17:00	G14	D12	G12	U6	D12	G12	
17:30	G14	D12	G12	U6	G14	G12	
18:00	G14	G14	D14		G14		
18:30	D16/18	G14	D14		AA		
19:00	D16/18	G14	D14		AA	D16/18	
19:30	D16/18	G17	AA		AA	D16/18	
20:00	D14	G17	AA		D16/18		
20:30	D14	AA	AA		D16/18		
21:00	G17	AA	D16/18		G17		
21:30	G17	AA	D16/18		G17		
22:00	G17		D16/18		G17		
22:30							

Deildir	Viðmerkingar
AA	
D16/18	
D14	
D12	
D10	
G17	

Deildir	Viðmerkingar
G14	
G12	
G10	
U8	
U6	

VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2013/2014

Deild	Heiti	Navn	Telefon	Teldupost
AA/1.deild	Høvuðsvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
	Høvuðsvenjari	Halgir Dahl Olesen	235940	halgirdahlolesen@gmail.com
	Kroppsligur venjari	Snorri Patursson	299528	snorripatursson@hotmail.com
AA	Liðleiðari	Lars Tornefeldt	266287	lars_tornefeldt@hotmail.com
	Hjálpari	Rene Dahl Olesen	235930	renedahlolesen@gmail.com
	Málmansvenjari	Jens á Skipagøtu	280325	skipagota@gmail.com
D16/D18	Høvuðsvenjari	Mark Marcher	503997	marci604@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Rúni Højgaard	261415	runi_hoyvik@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Hallur Biskupstø	549096	hillar_1993@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Ári Jógvansson Olesen	595047	Arijolsen90@gmail.com
	Hjálparvenjari	Gunnar Djurhuus	219082	gunnardjurhuus@gmail.com
D14	Høvuðsvenjari	Jónas G. Djurhuus	506996	jonash71@gmail.com
	Hjálparvenjari	Djóni Gaard Joensen	504488	djgajol@hotmail.com
D12	Høvuðsvenjari	Mark Marcher	503997	marci604@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Karl Oddmar Rasmussen	508338	karlor@live.dk
	Hjálparvenjari	Gilli Wardum	220505	gilli.wardum@gmail.com
	Hjálparvenjari	Petur Mittún	218284	peturmittun@gmail.com
	Hjálparvenjari	Andor Sivertsen	589401	andor95@gmail.com
	Hjálparvenjari	Hans Kári Hansen	264826	hanskari@hotmail.com
D10	Høvuðsvenjari	Mark Marcher	503997	marci604@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Djóni Gaard Joensen	504488	djgajol@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Pætur Thomsen	509866	paturthomsen@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Poul Símun Niclasen	503769	poulsimun@hotmail.com
G17	Høvuðsvenjari	Petur Martin Johansen	296260	billutir@billutir.fo
	Hjálparvenjari	Tróndur Arge	262634	trondurarge@hotmail.com
G14	Høvuðsvenjari	Jakob Jónsson	764679	jakob@pm.fo
	Hjálparvenjari	Helgi H. Hoydal	503850	helgihoydal@gmail.com
	Hjálparvenjari	Hallur Danielsen	231983	hallur@hsf.fo
G12	Høvuðsvenjari	Hendrik Egholm	237410	hendrik@magn.fo
	Hjálparvenjari	Annika Thorsvig	217844	annikath@torshavn.fo
G10	Høvuðsvenjari	Mark Marcher	503997	marci604@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Hallur Danielsen	231983	hallur@hsf.fo
U8	Høvuðsvenjari	Mark Marcher	503997	marci604@hotmail.com
	Hjálparvenjari	Fróði Niclassen	583769	frodi-96@hhotmail.com
U6	Høvuðsvenjari	Bjørg Djurhuus	215490	bjd2406@gmail.com
Ungdóms	Málmansvenjari	Ári Egason Dam	512090	aed@eik.fo

TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN

ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700

Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

H71 klæðini 2014/15

H71 INTERSPORT® Thomas Dam ítróttur adidas®

Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315

Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Myklnesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909

SKORA
VIÐ SISU
SISU
Føroya Bjór

FAROE SHIP

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.

Heðin Weihe, verkstaðsleiðari

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.

Í Gullpakkanum fært tú:

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

samskip
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com

SENDISTOVAN

amr.fo

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
28.09.2014	H71	Neistin	24-27
08.10.2014	VÍF	H71	25-22
11.10.2014	H71	Kyndil	19-18
19.10.2014	KÍF	H71	19-23
25.10.2014	H71	T. Klaksvík	33-12
02.11.2014	StÍF	H71	20-24
06.11.2014	Neistin	H71	18-30
16.11.2014	H71	VÍF	24-27
19.11.2014	Kyndil	H71	21-19
30.11.2014	H71	KÍF	26-26
05.12.2014	T. Klaksvík	H71	21-25
13.12.2014	H71	StÍF	
20.12.2014	H71	Neistin	
01.02.2015	VÍF	H71	
15.02.2015	H71	Kyndil	
18.02.2015	KÍF	H71	
25.02.2015	H71	T. Klaksvík	
28.02.2015	T. Klaksvík	VÍF	
01.03.2015	StÍF	H71	
01.03.2015	KÍF	Kyndil	
07.03.2015	T. Klaksvík	Kyndil	
08.03.2015	StÍF	VÍF	
08.03.2015	Neistin	H71	
18.03.2015	H71	VÍF	
22.03.2015	Kyndil	H71	
29.03.2015	H71	KÍF	
01.04.2015	T. Klaksvík	H71	
04.04.2015	H71	StÍF	

STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	VÍF	11	298	251	47	18
2	Kyndil	12	257	238	19	15
3	H71	11	269	234	35	13
4	KÍF	11	289	291	-2	11
5	Neistin	12	279	308	-29	10
6	StÍF	12	294	319	-25	7
7	T. Klaksvík	11	235	280	-45	6

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:
1 Ári E. Dam
12 Hanus Kristiansen
16 Tóraldur kollsker

Útileikarar:
3 Mark Lauser Marcher
4 Rúni V. Højgaard
6 Djóni V. Højgaard
8 Pætur Thomsen
10 Hallur Biskopstø
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
21 Jesper Pedersen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jakobsen
99 Tróndur Arge

Venjarar:
Halgir Dahl Olesen og Petur Mittún
Málmansvenjari:
Jens á Skipagøtu
Liðleiðarar:
Lars Tornefeldt og Rene Dahl Olesen

StÍF

Málmenn
1 Eli Gærdum
12 Eyðfinn Poulsen

Útileikarar
2 Fríði R. Djurhuus
3 Teitur Nielsen
4 Eyðbjørn eriksson
5 Marius Joensen
6 Jón Rassmusen
7 Pætur Johansen
9 Sveinur Justinussen
10 Kjartan Johansen
11 Johannus Olsen
14 Jogvan G. Joensen
15 Jón Bech
17 Steinar A. Prestá

Bonkur:
Jónleif Solsker, Rósing Hansen og Levi Nybo

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

ÁBYRGD AV FALDARA
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

MYNDIR
Jan Egil Kristiansen, 262240

ÚTGEVARI
H71

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT · JOHAN J. LAMHAUGE